Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Helgi Abrahamsen, løgtingsmaður

Svarari: Kaj Leo Holm Johannesen, landsstýrismaður við heilsumálum

Evni: Endurvenjingar

Spurningar:

1. Hvør er orsøkin til, at fólk, ið fáa skurðviðgerð aðrastaðni enn í føroyska heilsuverkinum, missa rættin til endurvenjing í heilsuverkinum?

Viðmerkingar:

Nógv fólk standa á bíðilistum til at fáa skurðviðgerðir av ymiskum slagi. Tað er ikki óvanligt, at hesi fólkini hava egna trygging, ið gevur teimum rætt til at fara aðrastaðni at fáa skurðviðgerðina framda.

Men undirritaði hevur sæð dømi um, at fólk, ið hava umhugsað henda møguleikan, hava fingið at vita frá heilsuverkinum, at um tey velja hesa loysnina, so missa tey rættin til endurvenjing í heilsuverkinum.

Fyri tann sjúka kann bíðitíðin vera trupul, og tí er væl skiljandi, at fólk vilja nýta teir møguleikar ið eru, fyri at linna pínuna, men um avleiðingin er, at tey ikki fáa endurvenjing, so skulu tey velja ímillum skurðviðgerð beinan vegin uttan endurvenjing, ella at ganga við pínu, fyri at tryggja endurvenjingina seinni.

Tí verður spurt, hvør orsøkin er til hesa støðuna hjá heilsuverkinum.

Á Løgtingi, 19. mai 2022

Helgi Abrahamsen